


***Nr. 5*** ***1. mars 2020*** ***80. árg.***

# Tær fýra konurnar við Jesu kross

*Aril Edvardsen*

Fýra konur stóðu við Jesu kross, Maria, móður Jesusar – Salóme, systir hennara – Maria, kona Kleopasar – og Maria Magdalena. Tær bara savnaðu hugsan sína um Hann, sum hekk á krossinum.

Hesar fýra konur standa her sum umboð fyri mannaættina og vísa okkum vegin hagar, øll menniskju eiga at fara: til Jesu Kristi kross.

Hesar fýra konur, sum høvdu so ymiskt grundarlag, gjørdust allar eins við Jesu kross. Hóast teirra ólíku fortíð, gjørdust tær fullkomiliga eins, tí við Jesu kross verður fortíð okkara fjald og reinsað í Jesu Kristi blóði. Latið okkum hyggja eitt sindur gjøllari at hesum fýra við Jesu kross:

## Móður Jesusar, hin heilaga konan 1:4

Móður Jesusar, Maria, hevði verið heilag heilt frá barnaárunum. Tá ið vit lesa, at eingilin kemur til Mariu við teimum boðunum, at hon skal føða Frelsaran, skilja vit av orðunum hjá einglinum, at Gud hevði hildið sína hond yvir hesa ungu kvinnu heilt frá barnaárunum. Hon var vaksin upp í reinleika og heilagleika.

Hon var ein menniskja sum øll onnur. Men Gud hevði á ein serligan hátt varðveitt og vart hana frá syndini. Hon hevði altíð livað í nánd av Gudi og hevði verið so eydnusom ongantíð at gliðið út í syndina og heimin.

Tað er óivað onkur, sum lesur hetta, sum av Guds náði hevur fingið loyvi at upplivað nakað av tí sama. Tú hevur hoyrt Gudi til heilt frá tínari barnatrúgv. Tískil ert tú sloppin undan at falla í tær ræðuligu syndirnar, sum vit hoyra um í heiminum í dag. Gud hevur verið so góður móti tær. Tú kanst vera glaður og takksamur! Tú ert sloppin at vaksa upp í einum dámi av reinleika.

Sjálvandi hevur tú havt títt stríð, tínar trupulleikar og tvørleikar. Men Gud hevur varðveitt teg frá syndarinnar mongu sárum og skeinum. Tú hevur verið trúgvandi alt lívið.

Men lurta nú – og tú ert helst samdur við meg: tú mást eisini standa tætt inn til Jesu Kristi kross. Tað er við Jesu Kristi kross, at tín vón og tín framtíð eru. **Bara við krossin hevur tú tína frelsu**.

Hugsa tær, eisini Maria, hin heilaga konan, mátti til Jesu Kristi kross at finna frelsu! Maria, móður Jesusar, vísir øllum heiminum, hvar ið vit øll eiga at standa – tætt inn til Jesu Kristi kross.

*Effie Campbell* umsetti.

# Gud gavst ikki Ella: Himmalvegurin

Tað er av alstórum týdningi, at vit óttaleys breiða evangeliið út, tí frelsan er bara at finna í Kristusi. – Jesus sigur: „Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær.“ (Jóh. 14,6).

Hesin vitnisburðurin kemur úr Miðasia frá einum ungum manni, sum leitaði eftir vegnum til Himmals:

„Omma mín var ein gudrøkin muslimur, og hon bað tær siðbundnu bønirnar regluliga. Eg fór undir at seta henni spurningar. Eg veit ikki, hví omma ikki svaraði mínum spurningum. Kanska vildi hon ikki svara, ella kanska visti hon ikki svørini. Hon segði bara, at eg ikki kundi kenna Gud, og at eg bara skuldi minnast at biðja mínar bønir.

Eg var ikki nøgdur við svarið, so eg fór yvir í moskuna. Eg eygleiddi fólkini har, og eg tosaði við mullain; men eg fekk framvegis einki svar. Vónsvikin fór eg heim aftur og gjørdi av, at eg skuldi fara at søkja Gud onkra aðrastaðni. Eg gjørdist

limur í Hare Krishna, seinni hitti eg fólk úr Baha'l sektini, men báðar staðir var eg bara í ein mánað. At enda bað eg: „Eg veit ikki, hvør tú ert: Allah, Buddha, Krishna ella Jesus? Eg veit bara, at tú ert til, og at tú hoyrir meg. Vilt tú vísa mær einasta rætta vegin?“

Dagin eftir fór eg inn í býin á lærda háskúlan. Í tokinum møtti eg trimum monnum – teir vóru kristnir. Tveir teirra vóru kosakkar, og teir vóru teir fyrstu, sum søgdu mær frá Jesusi. Teir vístu mær eitt vers í Bíbliuni, har Jesus sigur: „Eg eri vegurin og sannleikin og lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær.“ (Jóh. 14,6). Her var svarið til spurningin hjá mær. Men eg gjørdi av, at hetta mátti vera av tilvild.

Men í næstu lestrarhálvu spurdi eg aftur Gud, um hann vildi vísa mær vegin. Tað komst av tí, at harðskapur, neyðtøkur og morð vóru framd á mínum studentabústaði. Alt hetta fekk meg at søkja Gud enn eina ferð. Ein dagin møtti eg einari kosakiskari kristnari gentu. Hon tosaði um Jesus; men eg setti meg upp ímóti tí og royndi at prógva, at islam var sannleikin, sjálvt um eg ikki trúði tí longur. Gentan mutaði ikki ímóti, men hon blaðaði upp í Nýggja Testamenti og las júst sama versið fyri mær, sum menninir í tokinum høvdu víst mær.

Enn eina ferð metti eg, at hetta var tað bera hepni. Ein mánað seinni møtti eg einari usbekiskari kristnari gentu, og eg fór eisini at kjakast við hana. Men hon læt Bíbliuna upp á sama staði, har Jesus sigur: „Eg eri vegurin …“ Nú dugdi eg at síggja, at hatta var svarið upp á mín spurning, og at svarið kom frá Gudi sjálvum.“

***Kelda:*** *TWR Centralasien*
*Effie Campbell* umsetti.

# Skulu vit altíð fylgja okkara hjarta?

*Sten Sørensen*

Humanisman hevur sterka ávirkan á samfelag okkara. Hon setir menniskjað í miðdepilin og leggur dent á tær dygdir, sum eyðkenna menniskjað og sigur, at menniskjað hevur virði í sjálvum sær og evni til skilagóða hugsan. Nógv gott er í humanismuni, sum kristindómurin kann taka undir við, men har, sum menniskjað verður í fokus í alheiminum, tekur tað

plássið frá Skaparanum. Í humanismuni er tað týdningarmikið at liva, sum kenslurnar siga tær. Humanisman sigur, at menniskjuni eru fræls og ikki undirløgd nøkrum.

Bíblian hevur eitt annað fokus enn humanisman. Hon talar sjálvandi eisini um hjartað: „Fram um alt, ið verður varðveitt, varða títt hjarta, tí at har er tað, at lívið sprettur upp.“ Orðt. 4,23.

Sjálvsagt skulu vit varðveita hjartað. Tí tørvar venjing. Vit mugu verja tað fyri røddir og hugskot uttanífrá. Hjartað verður díkt undir við hugskotum og meiningum alla tíðina.

Men tað kann verða lívshættisligt bara at fylgja hjartanum! Hygg í Matt. 15,19, har sært tú, hvat ið Jesus sigur um hjartað. Hann nevnir óndar hugsanir, manndráp, hordóm, siðloysi, stuldur, rangar vitnisburðar, spottan. Alt hetta kemur úr hjartanum, sigur Jesus.

Jesus segði ongantíð: Fylg tínum hjarta. Men hann segði: **Fylg mær!**

Okkara innskot og hugsanir skulu vit taka til okkara úr Himlinum, ikki bara úr hesi verð. Tí skalt tú ikki bara fylgja tínum hjarta, men fylg eisini Jesusi og hansara livandi orði. Tá fer hansara sjónarmið at ávirka okkara gerandisdag, val og gerningar. Hann vil stutt sagt seta dám á okkara hjarta.

Vit kunnu eisini biðja bønina hjá Dávidi: „Skapa, Gud, mær hjarta reint, gev mær av nýggjum fastan anda mær í brósti!“ Sálm. 51,12.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Heimspekingurin Emanuel Kant úr Køningsberg, nú Kaliningrad, segði: „Tað eru tvær lógir, sum noyða meg at trúgva á Gud. Tað er hin magnetiska lógin í stjørnuverðini, og samvitskunnar lóg innan í mær.“

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. mars | Tekstur: | Matt. 7,24-27 | bíbliuorð: | Matt. 7,24 |
| 8. mars | Tekstur: | Luk. 15,4-7 | bíbliuorð: | Jóh. 10,11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 6* *15. mars 2020* *80. árg.*

# Hunangstónin – Himmaltónin

*Emanuel Minos*

Jesus hevði 70 lærusveinar, hann hevði 12 lærusveinar, hann hevði 3 lærusveinar, og hann hevði ein lærusvein, sum lá inn at barmi hansara við kvøldmáltíðina. Hesin lærusveinurin fylgdi Jesusi allan vegin og stóð undir krossi hansara. Tað var Jóhannes, kærleikans ápostul. Maria, Jesu móður, stóð eisini har. Tað var jú hon, sum hevði føtt hann til menniskja. Hon sær hendur og føtur hansara negldar til krossin. Jesus sær hennara tár og neyð, og hann sigur við Jóhannes: „Tak tær av móður tíni!“ Tað var jú Jesu móðir; men har fekk Jóhannes eina uppgávu við krossin. Hatta var ein vakur tóni frá himli, og hann kunnu vit uppliva við krossins fót.

Fyri mongum árum síðani búði ein violinúrmælingur í Póllandi, sum æt Bronislaw Huberman. Hann var størsti violinleikari í Póllandi nakrantíð. Hann royndi alt lív sítt at fáa fram tað, sum týskarar kalla hunangstónan. Tá spælir tú og titrar og darrar á ein ávísan hátt, sum skal vera heilt einastandandi fyri hitt musikalska oyrað. Men hann megnaði tað ongantíð.

Hann var pólskur jødi. Foreldur hansara vórðu send í gasskømrini, kona hansara og børnini við vórðu send í gasskømrini; men sjálvur megnaði hann at koma undan við lívinum, og hann slapp sær yvir til Onglands.

Hesa frásøgnina havi eg hoyrt í útvarpinum, og eg sigi hana so væl, sum eg minnist hana. Onglendingar vóru heilt uppøstir, at ein av heimsins bestu violinleikarum var komin til Onglands. „Huberman, tú mást spæla fyri okkum,“ søgdu teir.

„Eg orki ikki at spæla longur. Eg havi mist foreldur míni. Eg havi mist konuna og børnini. Eg havi mist alt. Eg eigi einki eftir. Eg orki ikki at spæla,“ segði hann.

Men teir hildu á at júka, og at enda segði hann: „Eg skal spæla eitt stykki og ikki meir.“

Teir leigaðu so Royal Albert Hall, haldi eg tað var. Tann høllin rúmar 10.000 fólk, og hon var stúgvandi full, tí tað var jú Bronislaw Huberman, sum skuldi spæla. So stendur hann har á pallinum við 10.000 lukkuligum onglendingum framman fyri sær. Eingin teirra hevði upplivað gasskømrini.

So tekur hann violinina, og tá sær hann pápa sín og mammu sína fyri sær, hann sær konu sína og børnini, hann sær alt, sum liggur í sori í lívi sínum. So tekur hann bogan og fer at spæla, og so hevur hann tað! Fyri fyrstu ferð í lívi sínum hevur hann tað, hunangstónan!

Og hann gjørdist so rørdur, at hann spældi og spældi. Hann spældi ikki bara eitt stykki, nei, hann helt á at spæla eitt stykki fyri og annað eftir alt kvøldið.

Tá ið hann var liðugur, fóru 10.000 onglendingar á føtur – tit vita, hvussu tað plagar at vera, tá ið fólk eru hugtikin, tá reisast tey og klappa – men 10.000 onglendingar reistust, boygdu høvur og grótu. Hann hevði spælt fullkomið. Tey høvdu hoyrt hunangstónan.

Dagin eftir skrivaði London Times: „Ummælarin boyggir seg niður í dustið fyri tí fullkomna.“ Hann kundi ikki skriva nakað annað. Hann hevði rakt hin tónan, hin undurfulla hunangstónan, sum er so torførur at fáa fram.

Eg veit ein tóna, sum er meir enn hunangstónin, og tað er Jesus–tónin. Tú kanst møta fólki, ja, so møtir tú teimum, og so kanst tú møta onkrum øðrum, og so møtir tú Jesusi í teimum. Eg finni henda hunangstónan í 1. Jóh. br. 4,11: „Elskaðu tit, hevur Gud soleiðis elskað okkum, tá eiga vit eisini at elska hvør annan.“

Á, vit mugu út við hesum undurfulla tónanum. Hevur Gud elskað okkum, tá eiga vit eisini at elska hvør annan. Á, tann undurfulli tónin frá Golgata, sáttargerðartónin. Vit kristnu eru ikki betri enn onnur. Nei, Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar. Men vit hava fingið ein tóna úr Himli, fyrigevingartónan, vit skulu fyrigeva hvør øðrum, vit, sum

hava fingið fyrigeving, tí „blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd.“ 1. Jóh. br. 1,7.

*Effie Campbell* umsetti.

# Salóme, yvirstættarkonan 2:4

*Aril Edvardsen*

Hin næsta konan, sum stóð har við krossin, var systir Jesu móður, Salóme. Vit hava øll hoyrt, at hon var gift við Sebedeusi og var móður at ápostlunum Jákupi og Jóhannesi. **Hon hevði gift seg inn í eina ríka familju, sum hoyrdi til yvirstættin**, og hon kendi høvuðsprestin og teir hægru stættirnar í Jerusalem. Hetta kemur eisini fram, tá ið Jesus verður førdur til høvuðsprestin. Tá er Jóhannes har. Hann er vanur at ganga inn og út í hesum umhvørvinum, og hann fer yvir til duravørðin og biður hana lova Pæturi inn.

Men hoyr – eisini hon, Salóme, mátti yvir til Jesu Kristi kross!

Eg kvíði fyri, at mong hava ta uppfatan, at evangeliið er bara fyri eitt serligt sosialt fólkaslag. Men evangeliið er fyri øll samfelagsløg, rík og fátæk. Eingin nær fram til Himmalin uttan fyrst at hava fingið syndir sínar fyrigivnar við Jesu Kristi kross. Við krossin eru øll líka.

Hoyrir tú upp í tey, sum vit kalla tey „fínaru“ fólkini, so mást tú kortini stilla teg við Jesu Kristi kross. Tí uttan mun til hvørji vit eru, rík ella fátæk, hoyra upp í yvirstættin ella aðalin, so mugu vit øll møta Gudi við Jesu Kristi kross.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein kyrtil við ongum seymum

*„ ... men kyrtilin var óseymaður, vovin í einum oman ígjøgnum.“ Jóh. 19,23.*

Bíblian sigur ikki nógv um Jesu klæðir – men eitt undantak er tó. Jóhannes sigur okkum frá hesum, tá ið hann greiðir frá, hvat ið hendi á Golgata. „Teir tóku eisini kyrtilin, sum var óseymaður, vovin í einum oman ígjøgnum,“ greiðir hann frá. Tað var siður hjá jødiskum mammum, at tær seymaðu ein sovorðnan kyrtil til synir, sum skuldu fara heimanífrá. Vit vita ikki, um Maria man hava gjørt henda kyrtilin til Jesus; men hann var kortini

eitt dýrabart plagg. Hann var eisini týdningarmikil, av tí at klæði gjøgnum alla Bíbliuna vóru tekin um atburð og muru.

Pætur skrivar: „ ... klæðist øll í litillæti hvør móti øðrum.“ 1. Pæt. 5,5. Paulus sigur: „Tí at tit, so mong sum eru doypt til Krists, tit hava íklæðst Krist.“ Gal. 3,27. Og Dávid sigur okkum, at ónd menniskju eru latin „ ... í bølbiðjan (forbandelse) sum eini klæði.“ Sálmur 109,18.

Jesus var eins og kyrtilin hjá sær, har var einki „seymað uppí“ – hann var heilskapaður og fullkomin. Orðini „vovin í einum oman ígjøgnum“ bendir á, at hann var stýrdur av Guds tonkum. Hann segði sanniliga: „Sonurin kann als einki gera av sær sjálvum, annað enn tað, sum hann sær faðirin gera.“ Jóh. 5,19.

Men tá ið Jesus var krossfestur, læt hann seg úr sínum dýrabara kyrtli, býtti um pláss við okkum, og læt seg í syndina, sum bar **okkara** nøvn. Hann doyði sum ein vanligur brotsmaður fyri syndir, sum hann ongantíð hevði gjørt, so at vit kundu sleppa at bera hansara rættvísis klædning. Fyri at syndarar sum vit kunnu koma víðari, um vit leita til krossin – koma víðari og siga: „Stórum eg gleðist í Harranum, um Gud mín fegnast mín sál, tí at hann hevur latið meg í frelsubúna, sveipað meg í rættlætis skikkju.“ Jes. 61,10.

Hugsa tær, Jesus hevur ikki bara fyrireikað eitt pláss í Himli til okkara. Hann hevur eisini tryggjað sær, at vit eru hóskandi ílatin til hetta høvið!!

*„ ... et Ord til Dagen“*
*Effie Campbell* umsetti.

# Óheimligt

Fólk siga: „Eg kenni meg ikki væl til passar í einari kirkju.“ Og tað kann væl vera sannleikin! Evangeliið er tilevnað, designað, til at ugga tey plágaðu og plága tey makligu og løtu. Summi fólk ristust, tá ið Paulus prædikaði; men tá ið ein skjálvtan førir til trúgv á Kristus, er tað gott.

*e.c.* ums.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 15. mars | Tekstur: | Matt. 22,1-14 | bíbliuorð: | Matt. 22,4 |
| 22. mars | Tekstur: | Luk. 15,11-32 | bíbliuorð: | Jóh. 6,37b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74